# EFTIRMETING AV BREYTASKIPANINI

Handað landsstýriskvinnuni í mentamálum. Rigmor Dam.

10. september 2018

**Innleiðing** ... 3
**Arbeiðssetningur** ... 4
Arbeiðsháttur ... 5
Skipan av hesum áliti ... 5
**Tilmæli í stuttum** ... 7
Fíggjarligar avleiðingar ... 7
**Bygnaður** ... 9
Breytirnar ... 9
Fyrireikingarbreytin ... 10
Felagslærugreinar ... 10
Føroyskt ... 10
Lestrarmenning ... 11
Søga ... 11
Samfelagsfrøði C ... 12
Breytalærugreinar ... 12
Danskt A ... 13
Støddfrøði B - Tilfeingisbreytin ... 13
Samskiftistøkni C – Tøknibreytin ... 14
Vallærugreinar ... 14
Tímatøl ... 14
Næmingatíð ... 15
Leiðir ... 16
**Lærugreinar** ... 17
Námsætlanir ... 17
Tvørfakligt samstarv ... 17
Breytauppgávan ... 18
Breytaverkætlanin ... 18
Mállærugreinarnar ... 19
Lærugreinaráðgevar ... 20
Toymir ... 20
Námsferðir ... 21
**Próvtøkur** ... 21
Undirvísingarfrágreiðingar ... 21
Próvtøkuhættir ... 21

Tal av próvtøkum ..... 21
Hagtøl ..... 21
**Yvirlit yvir framløgur hildnar á fundunum** ..... 22
**Yvirlit yvir tilfar, sum er latið landsstýriskvinnuni fyri seg** ..... 23

# Innleiðing

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Rigmor Dam, setti í februar mánaði 2017 eina nevnd at eftirmeta gymnasialu breytaskipanina. 14 limir umboðandi skúlaleiðslur, lærararáð í skúlunum, Próvstovuna, Yrkisfelagið Miðnám, álitisfólk og Mentamálaráðið vórðu tilnevndir. Tilnevningarskriv varð latið limunum 2. februar 2017, og fyrsti fundur varð ásettur 13. februar 2017.

Hildnir hava verið 13 fundir, og nevndin hevur gjøgnumgingið, framlagt og viðgjørt økini innan bygnað, lærugreinar og próvtøkur, sum eru nevnd í arbeiðssetninginum. Umframt nevndarlimirnir hava umboð fyri mállærugreinar og lærugreinina søgu luttikið á hvør sínum fundi og lagt síni sjónarmið fram fyri limunum.

Limirnir í nevndini hava verið:

| | |
|---|---|
| MMR, formann | Sámal í Skorini (var við á 10 fundum. Eftir tað gjørdist Hanna Ziskason Hansen formaður) |
| Próvstovan | Helga Foldbo |
| Leiðslan Glasir | Bogi Bech Jensen (var við á 5 fundum. Eftir tað kom Elsa Maria Holm Olsen í nevndina fyri hann. Bogi Bech Jensen var so aftur við í endaliga arbeiðnum) |
| Leiðslan Miðnám á Kambsdali | Páll Isholm |
| Yrkisfelagið Miðnám | Kári Jespersen |
| Leiðslan á Tøknibreytini | Hanna Ziskason Hansen |
| Leiðslan á Tilfeingisbreytini | Eyðun Leo |
| Lærugreinaumboð | Alt eftir lærugrein (Hanna Jensen hevur luttikið á einum fundi vegna mállærugreinarnar, og Súsanna Eikholm hevur luttikið á einum fundi vegna lærugreinina søgu) |
| LR-Suðuroy | Barbara Vest |
| LR-Handilsskúlin | Súsan K. Gregoriussen (var við á einum fundi. Herit Albinus kom síðani í nevndina fyri hana) |
| LR-Hoydalar | Sámal Matras Kristiansen |
| LR-Vestmanna | Kristinbjørg Høgnesen |
| LR-Kambsdal | Bergmann Finnsson |
| LR-Klaksvík | Gunnhild Dahl Niclassen |
| Álitisfólk | Nikolina Olsen |

Harumframt hevur Mortan Zachariasen frá Mentamálaráðnum verið skrivari á 5 fundum, og Ása Hansen frá Próvstovuni hevur verið skrivari á einum fundi.

## Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin, sum nevndin fekk, er endurgivin her:

*Í 2005 setti Mentamálaráðið nevnd at gera nýggja gymnasiala miðnámsskipan. Talan var um* ***eina skipan****, og talan var um stórar og grundleggjandi bygnaðarligar broytingar. Eftir drúgt og djúptøkið nevndararbeiði varð nýggja skipanin samtykt í Løgtinginum í 2012. Nógv orka varð sett av til framleiðslu av kunngerðum og námsætlanum, og í 2013 vóru fyrstu næmingarnir tiknir inn. Nú eru 3 ár farin og fyrstu næmingarnir hava fingið prógv eftir nýggju skipanini.*
*Tað er vert at hava í huga, at arbeiðið, sum liggur fyri framman,* ***ikki*** *er ein endurtøka av reformarbeiðinum frá 2005 til 2012, men at talan er um eina* ***endurskoðan****. Tað vil siga, at grundstrukturin, við* ***einari*** *skipan, við breytaskipan, við valskipan, við prógvtøkuskipan, við námsætlanum skal varðveitast. Hinvegin er ætlanin at fara í gjøgnum teir ymisku tættirnar fyri at kanna, hvat virkar, og hvat kundi virka betri – stutt sagt at justera ella rætta tey lýti, sum møguliga eru.*
*Í eftirmetingarsamanhangi er skilagott at býta skipanina upp í trý høvuðsøki, nevniliga: bygnaður, lærugreinar og próvtøkur. Tað, sum skal eftirmetast, eru nøkur sereyðkenni innan tey trý høvuðsøkini – sí niðanfyri:*

***Bygnaður:***

1. *Breytirnar*
2. *Felagslærugreinar*
3. *Breytalærugreinar*
4. *Vallærugreinar*
5. *Tvungin val*
6. *Tímatøl*
7. *Næmingatíð*
8. *Bond*
9. *Leiðir*

***Lærugreinar:***

- *Námsætlanir*
- *Tvørfakligt samstarv*
- *Breytauppgávan*
- *Breytaverkætlanin*
- *Mállærugreinarnar*
- *Føroyskt-Danskt*
- *Fakráðgevar*
- *Toymir*
- *Námsferðir*

***Próvtøkur:***

1. *Undirvísingarfrágreiðingar*
2. *Próvtøkuhættir*
3. *Tal av próvtøkum*

*4. Hagtøl*

***Dømi:***
*Økið: Bygnaður. Punktið: Breytirnar*
*Spurningar:*

*a) er talið av breytum hóskandi?*
*b) hava breytirnar tann rætta profilin?*
*c) Líkjast tær ov nógv?*
*d) náa breytirnar at vera lestrarfyrireikandi og almennandi?*
*e) náa breytirnar annars teimum stevnumiðum sum eru lýst í § 1 (endamálsorðingin)?*

*Uppskot til møguligar justeringar skulu so vítt gjørligt hava:*

*a) eina stutta orðing*
*b) eina ítøkiliga tilvísing til hvar í lógini/kunngerðunum/námsætlanini justeringin skal gerast*
*c) eina neyva meting av møguligum fíggjarligum avleiðingum*

*Dømi omanfyri skal á ongan hátt skiljast sum bindandi.*

*Málið er, at nevndin skal orða eitt hugskotskatalog við møguligum justeringum at lata landsstýriskvinnuni at taka støðu til.*

## Arbeiðsháttur

Formaðurin í nevndini heitti áðrenn hvønn fund á ein ella fleiri limir í nevndini um at lýsa málið, sum var sett á skrá, og síðani varð hvørt mál viðgjørt gjølla, og roynt varð at koma við ítøkiligum uppskotum til, hvussu møguligar betringar kunnu gerast, har tørvur var mettur at vera á tí. Formaðurin upprættaði harumframt eitt felags, talgilt skjal – eitt hugskotskatalog – og tey punktir, sum vóru frammi á fundunum, vórðu sett í hetta skjal. Síðani varð heitt á limirnar í nevndini um at gera viðmerkingar til einstøku punktini. Eftir hetta varð samandráttur skrivaður og sendur limunum til viðmerkingar í fleiri umførum. At enda varð álitið skrivað, viðgjørt, góðkent av limunum og latið landsstýriskvinnuni.

## Skipan av hesum áliti

Hetta álitið er skipað eftir sama leisti, sum arbeiðsetningurin, sum er endurgivin á síðu 4, er skipaður eftir. Tó so, at tilmælini, sum nevndin er samd um, standa í stuttum á síðu 6. Raðfylgjan av tilmælunum er eisini skipað samsvarandi leistinum í arbeiðssetninginum, og talan er ikki um ein raðfestingarlista av ymisku tilmælum. Á síðu 9 byrjar ein samandráttur av tí, sum hevur verið viðgjørt í nevndini, og greitt verður nærri frá ymisku tilmælunum. At enda er eitt yvirlit yvir framløgur og tilfar, sum er lagt fram á fundunum.

Hugskotskatalogið, sum er arbeiðsskjalið, sum vísir tey hugskot, sum hava verið frammi, við viðmerkingunum frá einstøku limunum, umframt tilfar, sum er lagt fram í nevndini, verður latið landsstýriskvinnuni fyri seg.

# Tilmæli í stuttum

Nevndin er samd um tilmælini niðanfyri. Talan er ikki um ein raðfestingarlista, men tilmælini standa í raðfylgju í mun til, hvar tey verða viðgjørd í álitinum. Í teim førum, nevndin ikki hevur greitt uppskot til loysn á avbjóðingini, sum liggur í tilmælinum, er tørvur á, at arbeiðsbólkur, mannaður við royndum miðnámsskúlalærarum, verður settur at gera ítøkilig uppskot.

1. Mælt verður til, at bygnaðurin á breytunum verður tillagaður soleiðis, at møguleikin at velja eyka A stig á ymisku breytunum gerst javnari Síða 9

2. Mælt verður til, at uppskot til nýggja fyrireikingarbreyt verður fyrireikað Síða 10

3. Mælt verður til, at møguleikin at velja danskt A verður betri Síða 13

4. Mælt verður til, at málið um næmingatíð sum heild verður viðgjørt neyvari Síða 16

5. Mælt verður til at endurskoðan og dagføring av námsætlanum verður sett í verk beinanvegin, og at vegleiðingar verða gjørdar til allar lærugreinar Síða 17

6. Mælt verður til, at skipað kunning og vegleiðing verður gjørd um tvørfaklig samstarv herundir greiðar vegleiðingar um, hvussu tvørfaklig avrik verða dømd umframt vegleiðing í sambandi við at skriva uppgávuorðingar Síða 18

7. Mælt verður til hesar broytingar í sambandi við breytaverkætlanirnar:
   - Dagatalið at skriva breytaverkætlan verður eins á øllum breytum
   - Møguleikin hjá næmingi at skriva í einari lærugrein verður betur
   - Munnlig próvtøka verður í breytaverkætlanini Síða 19

8. Mælt verður til, at spurningurin um týskt sum upptøkukrav verður viðgjørdur neyvari Síða 20

9. Mælt verður til, at byrjanarmál A og framhaldsmál B verða javnsett Síða 20

10. Mælt verður til, at lærugreinaráðgevar verða settir í starv beinanvegin Síða 20

## Fíggjarligar avleiðingar

Nevndin hevur ikki viðgjørt møguligar fíggjarligar avleiðingar av tilmælunum. Mett verður, at okkurt av tilmælunum hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar, men neyðugt er, at økta arbeiðsbyrðan og tímabrúkið hjá lærarunum og næmingum av tilmælunum, í hvørjum einstøkum føri, verða neyvt lýst. Limirnir í nevndini, sum umboða Yrkisfelagið Miðnám, hava gjørt vart við, at um nøkur broyting verður gjørd, sum á nakran hátt økir arbeiðsbyrðuna hjá lærarunum, er alneyðugt, at tímar fylgja við, og annað kann ikki góðtakast.

Herit Albinus

Bergmann Finnsson

Hanna Ziskason Hansen

Páll Isholm

Eyðun Leo

Bogi Bech Jensen

Barbara Vest

Sámal Matras Kristiansen

Helga Foldbo

Kristinbjørg Høgnesen

Kári Jespersen

Gunnhild Dahl Niclassen

Nikolina Olsen

# Bygnaður

## Breytirnar

Gymnasiala breytaskipanin gevur næmingum møguleika at velja ímillum 5 ymiskar 3 ára breytir, sum allar geva atgongd til hægri lestur, og eina tvey ára breyt, sum serliga er ætlað teimum, sum eru meira tilkomin, og sum gevur atgongd til stuttar og miðallangar hægri útbúgvingar.

Nevndin metir, at breytirnar hava greiðan profil og skapa fakligt grundarlag fyri hægri lestri og framhaldandi útbúgving, og at tær annars røkja tey stevnumið, sum eru lýst í endamálsorðingini í lógini. Mett verður tó, at nakrar tillagingar eiga at gerast.

Bygnaðurin á hugbreytini brýtur eitt sindur frá hinum breytunum, og nevndin er samd um, at her eigur ein tillaging at gerast, soleiðis, at hann líkist bygnaðinum á náttúru- og búskaparbreytini. Hugbreytin er einasta breyt, har kravt verður av næminginum, at hann tekur støðu til lærugreinar á A-stigi, tá hann søkir um upptøku. Mett verður, at hetta eigur at broytast, soleiðis, at hesi val bíða, eins og gjørt verður á hinum breytunum.

Nevndin er samd um, at talið á A-stigum er ov misjavnt ímillum breytirnar. Hetta er serliga óheppið, tá hugt verður eftir møguleikanum á ymisku breytunum at velja eyka A-stig. Samanbera vit hugbreytina og náttúrubreytina, vísir tað seg, at 38% av næmingunum, sum tóku prógv á hugbreytini í 2017 høvdu 6 A-stig. Hetta er 2 A-stig fleiri enn kravt er. Sama tíðarskeiðið er so at siga eingin, sum hevur 2 eyka A-stig á náttúrubreytini.

Harumframt hava 97% av næmingunum á hugbreytini eitt eyka A-stig, meðan hetta bert er galdandi fyri umleið helvtina av næmingunum á hinum breytunum. Hesin munur er óheppin, tí sambært § 40 í próvtøkukunngerðini verður próvtøkuúrslitið hjá næmingi, sum hevur 2 eyka A-stig, faldað við 1,06 meðan próvtøkuúrslitið hjá næmingi, sum hevur 1 eyka A-stig, verður faldað við 1,03. Næmingar, sum velja eyka A-stig fáa sostatt viðurkenning fyri hetta í próvnum.

Samanbera vit hugbreytina og náttúrubreytina, sæst, at fleiri orsøkir eru til munin:

- Munur er á tímatalinum í breytalærugreinunum. Til dømis er enskt A á hugbreytini 50 tímar færri enn støddfrøði A á náttúrubreytini.
- Dansk A fæst fyri 200 tímar á hugbreytini áðrenn fría valið. Á hinum breytunum fer danskt A av fría valinum.
- Munur er á næmingatíðini í breytalærugreinunum. Lærugreinar á hugbreytini hava minni næmingatíð enn lærugreinar á náttúrubreytini. Til dømis er næmingatíðin fyri 5 A-stig á hugbreytini ofta minni enn fyri 4 A-stig á náttúrubreytini. Hetta samsvarar ikki við, at næmingar, sum velja eyka A-stig fáa viðurkenning fyri hetta í próvnum, tí tað hevur við sær eyka arbeiði. Nevndin er samd um, at møguleikin at velja eyka A-stig á ymisku breytunum eigur at gerast javnari.

- **Tilmæli 1: Mælt verður til, at bygnaðurin á breytunum verður tillagaður soleiðis, at møguleikin at velja eyka A stig á ymisku breytunum gerst javnari.**

Í sambandi við bygnaðin varð eisini umrøtt, at møguleikin at velja mállærugreinar á búskapar-, náttúru-, tilfeingis- og tøknibreytini er avmarkaður. Hóast næmingurin á hesum breytum hevur møguleika at velja eina mállærugrein, t.d. danskt A, so skal hann fyrst velja lærugreinar, sum eru kravdar á breytini, og mállærugreinarnar skulu sostatt av tí fría valinum. Hetta hevur við sær, at undir 10% av næmingunum á hesum breytum, velja mállærugreinar. Hetta merkir somuleiðis, at um næmingar á hesum breytum velja danskt A, er hetta altíð eitt eyka A-stig hjá teimum.

Umboð fyri búskaparbreytina mæltu til, at kravið til búskaparlærugreinarnar á búskaparbreytini verður størri, soleiðis at profilurin verður greiðari. Hesi umboð mæltu til, at krav skal vera um at velja tvær búskaparligar lærugreinar á A-stigi. Skotið varð eisini upp, at søga A verður breytalærugrein á búskaparbreytini. Semja var tó ikki um hesi uppskot.

Ført er eisini fram, at heitið búskaparbreyt er ikki nóg greitt og átti at verið broytt til okkurt meira handilskent heiti. Nevndin var tó ikki samd um, at tørvur er á at broyta heitið.

## Fyrireikingarbreytin

Nevndin hevur ikki eftirmett fyrireikingarbreytina. Í donsku skipanini eru stórar broytingar gjørdar, og spurningur er tí settur við, um fyrireikingarbreytin, sum hon er skipað í løtuni, fer at geva atgongd til hægri lestur í Danmark í framtíðini. Hetta eigur at verða kannað, og greiða má fáast á, hvat høvuðsendamálið við fyrireikingarbreytini skal vera. Talan kann sostatt vera um at gera grundleggjandi og víðfevndar broytingar, og hetta fellur uttanfyri arbeiðssetningin, sum nevndin fekk.

- **Tilmæli 2: Mælt verður til, at uppskot til nýggja fyrireikingarbreyt verður fyrireikað**

## Felagslærugreinar

Felagslærugreinar á øllum breytum eru: føroyskt A, enskt B, søga C, støddfrøði C, samfelagsfrøði C, ítróttur og heilsa C og lestrarmenning. Sum heild var semja um, at felagslærugreinarnar eru tær røttu, tó skal innihaldið í onkrum av teimum endurskoðast. Lærugreinarnar, sum serliga varð tosað um í hesum sambandi, vóru føroyskt, lestrarmenning, søga og samfelagsfrøði.

### Føroyskt

Sum heild heldur nevndin, at føroyskt megnar væl uppgávuna um móðurmálsundirvísing. Tó varð víst á, at næmingar í dag skriva og lesa lítið føroyskt útyvir tað, tey fáa álagt í skúlanum. Tey lesa ikki føroysk bløð og lurta ikki eftir føroyskum sendingum. Føroyskt er ikki har, ið næmingar ferðast á netinum, og hetta sæst aftur í teirra førleika í føroyskum. Víst varð á, at lærugreinin føroyskt kundi verið styrkt við at fingið sjálvlisið verk inn í føroyskt. Mett varð, at hetta hevði økt lesiførleikan og kunnleikan hjá næmingunum um føroyskar bókmentir og mentan. Semja var tó ikki um, at hetta skal setast sum eitt beinleiðis krav.

Samanborið við aðrar lærugreinar á A-stigi hava málsligu lærugreinarnar og føroyskt minni næmingatíð. Støddfrøði A hevur t.d. 160 tímar í næmingatíð, og enskt A hevur 110 tímar, meðan føroyskt A hevur 100 tímar. Víst varð á, at føroyskt er ein lærugrein á A-stigi við skrivligari próvtøku og eigur ikki at hava verri sømdir enn aðrar lærugreinar á sama støði. Mett varð tí, at hóskandi hevði verið, at játta fleiri tímar til lærugreinina og hækkað næmingatíðina í føroyskum. Men heldur ikki her var semja um, hvør rætta loysnin er.

Lestrarmenning

Nakrir limir í nevndini meta, at lærugreinin lestrarmenning virkar ikki nóg væl, og eigur at endurskoðast. Aðrir limir í nevndini eru væl nøgdir við, hvussu henda lærugrein virkar, og halda ikki tørvur er á broytingum. Tað hevur víst seg at vera sera ymiskt, hvussu lestrarmenning verður skipað í skúlunum, og hetta er møguliga orsøkin til ymisku hugsanirnar.

Limirnir, sum halda tørvur er á broytingum, hava umrøtt tvær møguligar loysnir:

1. at uppraðfesta hana við fleiri tímum, nágreiniligari lýsing og vegleiðing. Hildið var, at tørvur er á eini neyvari lýsing av endamáli umframt sambandi ímillum lestrarmenning, breytauppgávu og breytaverkætlan.
2. at avtaka lærugreinina sum sjálvstøðuga lærugrein, og ístaðin áseta, at lestrarvegleiðarar saman við lærarartoymi fyri hvønn flokk samskipa nakrar undirvísingargongdir, har dentur verður lagdur á eina fakliga breidd og arbeiðshættir á einstøku breytini. Á henda hátt verða bæði næmingar og lærarar styrktir í at arbeiða saman tvørfakliga. Lærarar í ymisku lærugreinunum skulu hava ábyrgd av ymisku tættunum, sum eru partur av lestrarmenningini og átaka sær tær uppgávur, sum passa best til teirra aðalførleika.

Søga

Í løtuni er søga C ein felagslærugrein. Á búskaparbreytini er søga B ein breytalærugrein, og á hug- og náttúrubreytini er søga A breytalærugrein. Sum nevnt omanfyri undir bygnaður (síða 10), er skotið upp, at søga A gerst breytalærugrein á búskaparbreytini. At lyfta søgu frá C til A stig krevur bert 135 tímar, og hetta er færri tímar, enn aðrar lærugreinar krevja. Tað eru tó ikki øll umboð fyri búskaparbreytina, sum taka undir við hesum uppskoti.

Á tilfeingis- og tøknibreytini er søga B vallærugrein. Umhugsast skal, um søga B eigur at vera felagslærugrein. Tað vil siga, um krav skal setast til, at næmingar á tilfeingis- og tøknibreytini eisini skulu hava søgu á B stigi. Hetta hevði latið nakrar dyr upp hjá næmingum, sum ynskja hægri útbúgving innan samfelagsvísind í Danmark. At lyfta søgu frá C stig til B stig krevur bert 55 tímar, so hóast avmarkað pláss í tímatalvuni, varð víst á, at hesin møguleiki eigur at verða kannaður. Limirnir í nevndini, sum umboða tilfeingisbreytina taka ikki undir við, at søga B verður ein felagslærugrein og harvið kravd á tilfeingisbreytini, tí hetta fer at avmarka valmøguleikarnar á breytini ov nógv.

Ynski hevur verið frammi um, at krav skal setast til skrivlig avrik í lærugreinini søgu. Ført hevur verið fram, at næmingarnir í ávísan mun mangla venjing í at skriva, og umrøtt varð at seta krav um, at næmingarnir skriva eina uppgávu, har t.d. lærugreinirnar føroyskt og søga samstarva. Hetta hevði givið møguleika fyri meira venjing í at skriva uppgávu, arbeiða tvørfakliga, venja keldukritikk o.a. Semja var tó ikki um, at hetta skal setast sum eitt krav, og víst varð á, at hetta er eitt dømi um, hvat leiðsla skúlans kann brúka sín møguleika at hækka næmingatíð til. Sambært § 62 í undirvísingarkunngerðini skal leiðari útbúgvingarstovnsins seta 5 tímar av næmingatíð fyri hvønn næming á breytini í grunn at nýta til serlig átøk, og limir í nevndini hildu, at hetta tímatalið eigur at verða hækkað til 15 tímar fyri hvønn næming. Allir limir tóku tó ikki undir við hesum uppskoti.

Lærugreinaumboðið í søgu førdi fram, at ynskiligt er, at lærugreinin fær fleiri tímar. Ein loysn, sum víst var á, er, at søga fær tímarnar í lestrarmenning, sum so verður niðurløgd. Sum tað framgongur omanfyri, (síða 11) var ikki semja í nevndini um at niðurleggja lærugreinina lestrarmenning.

### Samfelagsfrøði C

Nevndin hevur umrøtt møguleikan at broyta lærugreinina samfelagsfrøði C frá at vera eina felagslærugrein til heldur at vera eina breytalærugrein. Hetta er grundað á, at allir næmingar í dag hava samfelagsfrøði í fólkaskúlanum, og við at broyta samfelagsfrøði C til eina breytalærugrein, verður betur pláss fyri øðrum lærugreinum. Samfelagsfrøði í fólkaskúlanum er tó á einum grundleggjandi støði, meðan samfelagsfrøði á miðnámi fer meiri ástøðiliga til verka. Harumframt er talan um eina royndarskipan í fólkaskúlanum.

Samfelagsfrøði C er bert nevnd beinleiðis sum upptøkukrav í heilt fáum førum í sambandi við hægri útbúgving í Danmark, men hetta er ein kravd lærugrein á øllum gymnasialum miðnámsútbúgvingunum í Danmark.

Semja var ikki um, at broytingar skulu gerast.

## Breytalærugreinar

Tá talan er um breytalærugreinar var sum heild semja um, at tær eru tær røttu á ymisku breytunum. Tó varð gjørt vart við, at onkrar tillagingar eiga at vera gjørdar.

Ført varð fram, at á búskaparbreytini eigur støddfrøði B at vera ein breytalærugrein, og møguliga eigur hetta eisini at vera galdandi fyri hugbreytina. Orsøkin til hetta er, at støddfrøði B er kravt á rættuliga nógvum hægri útbúgvingum í Danmark. Eisni varð nevnt, at lívfrøði og landafrøði eiga ikki at vera fastar breytalærugreinar á hugbreytini, men partur av fleiri náttúruvísindaligum lærugreinum, har tvær skulu veljast. Harumframt var nevnt, at danskt og latín eiga at gerast breytalærugreinar á hugbreytini. Semja var tó ikki um nakað av hesum.

Danskt A
Nakrir av limunum í nevndini hava skotið upp, at danskt A verður breytalærugrein á náttúru-, hug- fyrireikingar- og búskaparbreytini. Grundgeving fyri hesum uppskoti er, at nógvar av bókunum, sum verða brúktar í undirvísingini eru danskar, og ein stórur partur av føroyskum ungdómi, sum fer undir hægri útbúgving uttan fyri Føroyar, fer til Danmarkar. Hesir limir í nevndini vísa á, at vandi er fyri, at serliga skrivligi førleikin í donskum, sum hevur týdning fyri víðari lestur, vantar. Harumframt vísa tey á, at um vit styrkja danskt, stimbra vit eisini okkara norðurlendsku førleikar og samleika.

Aðrir limir í nevndini taka ikki undir við, at danskt A skal vera breytalærugrein, og vísa millum annað á, at spurnartekin kann setast við, um tað er førleikin í donskum, sum er grundleggjandi fyri, hvussu føroysk lesandi klára seg á hægri lærustovnum í Danmark. Víst varð eisini á, at tá talan er um lesnað á hægri lærustovni, er stórur partur av undirvísingartilfarinum ofta á enskum.

Í mun til hinar breytirnar, so hevur danskt A ongantíð verið kravd lærugrein á tilfeingis – og tøknibreytini, og umboðini fyri hesar breytir ynskja at halda fæst við hetta.

Semja var sostatt ikki um at danskt A skal vera kravd lærugrein, men víst varð á, at møguleikin at velja lærugreinina danskt A skal í staðin gerast betur. Sum nevnt omanfyri undir bygnaður (síða 10) eru fá, sum velja lærugreinina danskt A, og møguleikin at velja hana er avmarkaður. Eitt uppskot, sum varð umrøtt, er at lærugreinin verður lýst sum ein breytalærugrein. Tað vil **ikki** siga, at hon skal vera ein kravd lærugrein á nakrari breyt, men hon skal ístaðin hava sama "status" sum ein breytalærugrein, og skal sostatt ikki fara av fría valinum hjá næmingunum.

Í skipanini í dag eru lærugreinarnar bólkaðar í felagslærugreinar, breytalærugreinar, kravd val á breytini og fríar vallærugreinar. Lærugreinin danskt A er bólkað sum ein møguleiki undir *kravd val á breytini* á hugbreytini og fyrireikingarbreytini. Á øllum hinum breytunum er hon bólkað undir tí *fría valinum*. Við at flyta lærugreinina inn í bólkin breytalærugreinar, ella við at nevna lærugreinina beinleiðis, verður møguleikin at velja hana betur á øllum hinum breytunum.

Undirtøka er ikki í nevndini fyri at danskt skal vera kravd lærugrein á øllum breytum, sostatt verður mælt til, at møguleikin at <u>velja</u> danskt A verður betri.

- **Tilmæli 3: Mælt verður til, at møguleikin at velja danskt A verður betri**

Hetta kann gerast við at broyta § 6 - § 9 stk. 2 í undirvísingarkunngerðini.

Støddfrøði B - Tilfeingisbreytin
Umboð fyri tilfeingisbreytina mæla til, at støddfrøði B á tilfeingisbreytini eigur at verða lisið sambært námsætlan fyri støddfrøði B á náttúru-, hug og fyrireikingarbreytini. Hetta hevur verið gjørt, við undantaksloyvi, síðani breytaskipanin kom í gildi. Somu umboð vísa á, at undirvísingarkunngerðin eigur at verða broytt samsvarandi.

## Samskiftistøkni C – Tøknibreytin

Samskiftistøkni C er ein breytalærugrein á tøknibreytini. Valmøguleikarnir á tøknibreytini eru avmarkaðir, og umboð fyri tøknibreytina mæla til at geva næmingunum møguleika at velja ímillum lærugreinarnar samskiftistøkni C og kunningartøkni C. Hetta hevði givið næmingum, sum hava serligan áhuga fyri kunningartøkni og forritan, betur møguleika at velja hesar lærugreinar á hægri stigi. Hetta samsvarar við broytingar, sum eru gjørdar í Danmark.

## Vallærugreinar

Nevndin var samd um, at gott er við fleiri vallærugreinum hjá næmingunum at velja ímillum. Ynski vóru tó um, at avmarkingar eiga at vera settar í fría valinum, soleiðis at lærugreinar, ið eru tætt skyldar ikki kunnu veljast saman, millum annað tí tær kunnu eta av hvørjum øðrum, soleiðis at hvørgin verður upprættað. Sambært §25 í undirvísingarkunngerðini kann leiðari útbúgvingarstovnsins nokta næmingi at velja lærugrein, sum fakliga er nær skyld við lærugrein, hann áður hevur valt. Gjørt var vart við, at hetta eigur at gerast greiðari, og at tilskilað eigur at vera, hvørjar lærugreinar ikki kunnu veljast saman.

Harumframt varð ført fram, at tað eigur altíð at vera týðiliga viðmerkt í lógarverkinum, um ein lærugrein byggir á aðra lærugrein, har ikki greiður stigvøkstur er. Til dømis varð víst á, at tað eigur at vera greitt, at lærugreinin tøkni A byggir á tøknifrøði B og støddfrøði B, og næmingur eigur tí ikki at kunna velja lærugreinina tøkni A uttan so, at hann hevur havt hesar lærugreinar.

Somuleiðis eigur tað at vera greitt tilskilað, tá talan er um, at ein lærugrein er væl umboðað í aðrari lærugrein. Sum dømi varð víst á, at landafrøði er væl umboðað í lærugreinini tilfeingisfrøði B, og tí eigur ikki at vera møguligt hjá næmingi, sum hevur lærugreinina tilfeingisfrøði B, eisini at velja lærugreinina landafrøði C.

At enda varð ført fram, at fastar mannagongdir eiga at vera gjørdar í sambandi við at seta á stovn nýggjar lærugreinar. Talan kann t.d. vera um, at Mentamálaráðið ásetur í rundskrivi, hvørjar mannagongdir skulu fylgjast, tá ið nýggj lærugrein verður stovnað. Hetta hevði givið leiðslum í skúlunum møguleika at tikið stig til nýggja lærugrein.

## Tímatøl

Útbúgvingartíðin í lærugreinunum er ymisk, og í mun til gomlu skipanina eru ávísar broytingar í tímatølunum í ymisku lærugreinunum. Limirnir hjá Yrkisfelagnum Miðnám, sum eru umboðaðir í nevndini, hava víst á, at sambært kanning, sum felagið hevur latið gjørt, er tímatalið lækkað 20% í lærugreinum og skrivligi parturin er lækkaður 20% í miðal.

Aðrir limir í nevndini hava víst á, at kanningin ikki tekur hædd fyri, at í gomlu skipanini vóru tímar tiknir frá ymisku lærugreinunum til annað virksemi. Harumframt hava teir víst á, tímatalið

samsvarar í dag við tímatalið í donsku skipanini. Hetta ger skipanirnar sambæriligar og javnsetur næmingarnar við donsku næmingarnir, sum søkja um upptøku á somu hægri útbúgvingarstovnum, sum teir føroysku.

Næmingatíð

Í sambandi við umrøðu av næmingatíð varð ført fram, at hugtakið eigur at verða víðka til eisini at umfata aðrar avrikshættir enn skrivlig avrik, eins og gjørt er í nýggju skipanini í Danmark. Víst varð eisini á, at tað er ymiskt, hvussu lærarar handfara næmingatíðina, og tørvur er á betri vegleiðing um næmingatíðina sum heild.

Limirnir hjá Yrkisfelagnum Miðnám hava víst á, at sambært teirra kanning, sum eisini er víst til omanfyri (síða 14), er tíðin til skrivliga arbeiðið (næmingatíðin) minkað úr meira enn 1100 tímum niður í 650 tímar til hvønn næming, um samanborið verður við gomlu skipanina, og teir seta tí spurning við, um henda skipanin hevur sama støði, sum tann gamla.

Í sambandi við næmingatíðina vóru annars hesi viðurskifti havd á lofti:

1. samlað næmingatíð býtt millum árini
2. næmingatíð býtt millum árini í einstøku lærugreinunum
3. samlað næmingatíð í mun til A-stig
4. samlað næmingatíð í mun til breyt
5. næmingatíð í grunn

ad 1. Stórur munur er á, hvussu næmingatíðin verður býtt ímillum tey trý árini á miðnámi. Semja var um, at tað er óheppið, at so stórur partur av næmingatíðini liggur síðsta árið. Nøkur hildu, at næmingar ikki høvdu so nógv at gera fyrsta árið, og tí kundi nakað av næmingatíðini verið flutt frá triðja ári til fyrsta árið.

ad 2. Munur er eisini, á hvussu næmingatíðin verður býtt ímillum árini í einstøku lærugreinunum. Tosað varð um, hvussu § 60 og § 64 í undirvísingarkunngerðini, har leiðari útbúgvingarstovnsins kann tilluta næmingatíðina á annan hátt enn ásett í fylgiskjal 9, skulu skiljast. Tørvur er á greiðari reglum og vegleiðing um hetta.

Harumframt varð víst á, at næmingatíðin í ávísum lærugreinum ger tað ómøguligt at uppstiga eitt B-stig til eitt A-stig. Sum dømi kann nevnast, at spanskt B-stig hevur 0+15 tímar (fyrra árið+seinna árið) næmingatíð, meðan spanskt A-stig hevur 20+40+50 tímar (fyrsta + annað + triðja árið). Næmingur, sum kundi hugsað sær at valt spanskt A aftaná at hava havt spanskt B, manglar sostatt 45 tímar í næmingatíð, og hevur tí ikki henda møguleika. Ein møgulig loysn á hesum er, at allar lærugreinar hava eina ávísa næmingatíð í mun til stig, líkamikið um tær verða valdar á hægri stigi ella ikki. Hetta stríður tó ímóti ynskinum at flyta meiri næmingatíð niður í lægru flokkarnar.

ad 3. Víst varð eisini á, at næmingatíðin ikki altíð fylgir talinum av A-stigum. Dømi var givið um, at næmingur á hugbreyt við 6 A-stigum hevði minni næmingatíð, enn næmingur á náttúrubreytini við 4 A-stigum. Hetta varð mett at vera sera óheppið, tí tá fylgir arbeiðsbyrðan ikki A-stigunum, sum annars er hugsanin aftan fyri ásetanina í § 40 í próvtøkukunngerðini um at falda miðaltalið, tá talan er um eyka A-stig.

ad 4. Ført varð eisini fram, at næmingatíðin á hug-, náttúru- og búskaparbreytini eigur at hækka, og møguliga at vera eins høg sum á tilfeingis- og tøknibreytini. Mett varð, at skrivliga arbeiðsbyrðan í gomlu skipanini var størri, og at næmingar í dag skriva ov lítið, og at hetta ávirkar teirra førleikar. Harumframt var víst á, at ov stutt tíð er sett av til at rætta uppgávurnar. Víst varð á, at um næmingatíðin varð hækkað, høvdu allar lærugreinar kunnað fingið hægri næmingatíð umframt at t.d. søga aftur fekk skrivliga dimensjón. Onnur hildu, at tað er natúrligt, at ávísur munur er á næmingatíðini, tí á tøknibreytini er kravið til samlað tímatal hægri, umframt at talan har er verkætlanar- ella verkstaðstímar.

ad 5. Sambært §62 stk. 5 í undirvísingarkunngerðini skal skúlin seta 5 tímar fyri hvønn næming í grunn til ymisk átøk. Onkur helt, at hetta eigur at hækka til 15 tímar, fyri at geva betur pláss fyri námsfrøðiligum uppgávum í skúlunum. Onnur hildu, at arbeiðsbyrðan hjá næmingum er nóg stór sum er.

- **Tilmæli 4: Mælt verður til, at málið um næmingatíð sum heild, verður viðgjørt neyvari**

Leiðir

Leiðir eru ikki nevndar í lóggávuni ella kunngerðum. Talan er um, at skúlin bindir lærugreinar saman, og soleiðis letur næmingar velja "lærugreinapakkar". Nevndin sær bæði fyrimunir og vansar við hesum.

Fyrimunirnir, sum víst varð á, eru:

1. tær hava praktiskan týdning fyri ráðleggingina í skúlunum
2. tær eru ein møguleiki hjá skúlunum at skapa sær neyvari útbúgvingarprofilar
3. tær leiðbeina næmingum at velja sær miðnámsútbúgving
4. tær gera tað møguligt hjá øllum næmingum at fylgja somu undirvísing allan vegin við somu endaligu undirvísingarfrágreiðing. (Verða holdini sett saman frá nógvum ymiskum flokkum, mugu nógvar ymiskar undirvísingarfrágreiðingar samskipast, og tað skapar trupulleikar í mun til undirvísingarplanlegging og próvtøku.)
5. tær eru við til at tryggja felagslívið í flokkinum (næmingar fylgjast í skúlagongdini)
6. tær skapa betur grundarlag fyri at skipa samstørv tvørtur um lærugreinar

Vansarnir, sum víst varð á, eru:

1. landið er skipað í upptøkuøki, og tí fáa skúlarnir ikki gagn av at profilera seg við leiðum

2. leiðir missa sítt endamál, tá somu heiti verða nýtt um leiðir og breytir
3. tær eru við til at skapa eina meira fastlæsta skipan, har møguleikin hjá næmingunum at skapa sín egna útbúgvingarprofil verður skerdur
4. valmøguleikarnir á ymisku leiðunum eru ógvuliga ójavnir
5. tær geva bert meining, tá næmingagrundarlagið er stórt

Víst var annars á, at breytaskipaninin í sær sjálvum kann síggjast sum seks ymiskar lestrarleiðir, og tí kann tað virka órógvandi, tá skúlar bjóða ymiskar leiðir á breytunum.

Umrott varð, at lógin eigur at allýsa hugtøkini "breyt" og "leið" ella at forða skúlum í at samanteggja ávísar lærugreinar í lærugreinapakkar. Eisini varð nevnt, at Mentamálaráðið eigur at góðkenna leiðir, og at minsta krav má vera, at heitið á leiðini ikki líkist heitinum á eini breyt.

Nevndin kom ikki til semju um hetta, men umboðini fyri lærarar á Glasi, Hoydalar, mæla til framhaldandi lestrarleiðir.

# Lærugreinar

## Námsætlanir

Semja er um, at allar námsætlaninar eiga at verða dagførdar, og allar eiga at vera skornar eftir sama leisti. Tá talan er um bygnaðin av námsætlanunum er ført fram, at partarnir "Støðisførleikar" og "At skipa undirvísing" eru almennir og galdandi fyri allar lærugreinar og eiga tí at verða fluttir í ein almennan part, skildur burtur frá ítøkiligu námsætlanum.

Fleiri ynski eru sett fram um dagføringar og broytingar í námsætlanunum. Ynskini eru nógv og ymisk og lýsa stóra tørvin á, at ein dagføring verður gjørd. Stórur tørvur er framvegis á at skipað verður fyri lærugreinafundum og skeiðum, har lærarar fáa kunning, vegleiðing og fakliga ráðgeving umframt hava møguleikan at samskifta og umrøða ivamál. Harumframt eiga vegleiðingar at verða gjørdar til allar námsætlanir.

- **Tilmæli 5: Mælt verður til at endurskoðan og dagføring av námsætlanum verður sett í verk beinanvegin, og at vegleiðingar verða gjørdar til allar lærugreinar**

## Tvørfakligt samstarv

Í undirvísingarkunngerðini eru ásetingar um tvørfakligt samstarv, tá talan er um breytauppgávu og breytaverkætlan. Harumframt er ásett í námsætlanunum í fleiri lærugreinum, at arbeiðast skal tvørfakliga.

Sera nógvar avbjóðingar vísa seg at vera í sambandi við at arbeiða tvørfakliga. Tørvur er á at gera eina lýsing av, hvat endamálið við tvørfakligum samstarvi er, hvussu arbeiðast kann tvørfakliga, hvørji krøv eiga at verða sett, og hvussu eitt avrik skal dømast.

## Breytauppgávan

Kravið um at skriva breytauppgávu er eins á øllum breytum, og eitt av endamálunum er at fyrireika næmingar at skriva breytaverkætlan triðja árið. Á fyrireikingarbreytini er onki krav um breytauppgávu, men hóast tað er kravið um breytaverkætlan eisini galdandi har. Breytauppgávan í sjálvum sær fekk annars ikki nógva umrøðu í nevndini, men víst varð á, at avbjóðingarnar í sambandi við breytaverkætlanina møguliga eru tekin um, at meira tíð og orka eigur at verða løgd í breytauppgávuna, tí hon er ein liður í fyrireikingini til breytaverkætlanina og hevur sostatt ein týðandi leiklut, tá talan er um at skipa tvørfakligt samstarv og at vegleiða og skriva uppgávu.

## Breytaverkætlanin

Stór ónøgd er um breytaverkætlaninar, soleiðis sum tær verða skipaðar og próvdómdar, og semja tykist vera um, at her mugu broytingar gerast. Fleiri dømi eru um ósemjur og kærur, og tørvur er á greiðari vegleiðing um, hvørji krøv verða sett til tvørfakligheit, hvussu tvørfaklig avrik verða dømd, og eisini á vegleiðing í sambandi við at skriva uppgávuorðingar.

- **Tilmæli 6: Mælt verður til at skipa kunning og vegleiðing verður gjørd um tvørfakligt samstarv herundir greiðar vegleiðingar um, hvussu tvørfaklig avrik verða dømd umframt vegleiðing í sambandi við at skriva uppgávuorðingar**

Í skipanini í dag er dagatalið at skriva breytaverkætlan á trý ára breytunum ymiskt. Næmingar á búskapar-, hug-, og náttúrubreytini hava 10 dagar, meðan næmingar á fyrireikingar-, tilfeingis-, og tøknibreytini hava 5 dagar. Hetta kann tykjast ørkymlandi, tá próvdómt verður.

Mett verður harumframt, at møguleikin hjá næmingi, sum ynskir at fara í dýpdina í øki innan eina lærugrein, eigur at vera betur, og avgerðin um at loyva hesum eigur at liggja hjá vegleiðaranum heldur enn hjá leiðara útbúgvingarstovnsins, sum tað ger nú.

Víst er eisini á, at munnlig próvtøka eigur at vera í breytaverkætlanini. Mett verður, at næmingar eiga at hava møguleikan at greiða frá tí arbeiði og teim úrslitum, teir hava brúkt tíð og orku upp á, og at lærarar og próvdómarar eiga at hoyra næmingin og hava høvi til at seta spurningar. Hetta er eisini ein roynd at minka um møguligt snýt í sambandi við breytaverkætlanina.

Semja er um, at:

1. Dagatalið at skriva breytaverkætlan skal vera 10 dagar á øllum breytum. Vegleiðing kann vera partur av teim 10 døgunum. Talan er um broyting av §16 stk 11,12 og 13 og §22 stk. 3 í undirvísingarkunngerðini.
2. Avgerðin um at loyva næmingi at skriva í einari lærugrein skal vera grundað á meting hjá vegleiðara. Tað vil siga, at um vegleiðingin av evni, næmingur hevur valt, peikar á, at uppgávan kann loysast í einari lærugrein, kann vegleiðari taka støðu til, at so verður. Talan

skal tá vera um lærugrein á A-stigi. (Í dag liggur henda avgerð hjá leiðara útbúgvingarstovnsins, og krevur umsókn frá næmingi sambært § 22 stk. 5 í undirvísingarkunngerðini)

3. Munnlig próvtøka eigur at vera í breytarverkætlanini.

- **Tilmæli 7: Mælt verður til at omanfyrinevndu broytingar verða gjørdar í sambandi við breytaverkætlaninar**

Málllærugreinarnar

Ført hevur verið fram, at næmingarnir lesa ov lítið. Hetta ger seg galdandi bæði í føroyskum og donskum, og limirnir hjá Yrkisfelagnum Miðnám í nevndini hava tí mælt til, at krøv verða sett til sjálvlisin verk í hesum lærugreinum. Mett verður, at hetta vildi styrkt um lesiførleikan hjá næmingunum og um kunnleikan til føroyskar og norðurlendskar bókmentir og mentan.

Nevndin hevur umrøtt møguleikan at seta týskt sum upptøkukrav til hugbreytina. Hetta fyri at styrkja um fremmandamálini í skipanini, og fyri at halda fast í venjingini hjá næmingunum í at læra fremmandamál. Ført er fram, at um vit framhaldandi skulu duga fremmandamál í Føroyum, so mugu vit viðurkenna, at neyðugt er at læra enn eitt fremmandamál í fólkaskúlanum eftir enskt. Upplagda valið er týskt, sum hevur sama málsliga uppruna sum føroyskt og tí stuðlar væl okkara móðurmáli. Samstundis víkir tað so mikið grundleggjandi frá enskum, at tú við báðum málunum ognar tær eina breiðari málsliga fatan.

Víst varð harumframt á, at royndir vísa, at næmingar, sum hava neyðuga málsliga førningin við sær frá fólkaskúlanum, klára seg betur í øllum fremmandamálum á miðnámi. Týskt í fólkaskúlanum er sostatt við til at lyfta stigið í fremmandamálunum sum heild á miðnámi, sum eisini er neyðugt, um næmingarnir skulu fóta sær so mikið, at teir megna at brúka eitt byrjanarmál sjálvstøðugt eftir lokið miðnám. Sostatt talar nógv fyri at halda fast í týskt sum krav fyri at koma inn á, í øllum førum, hugbreytina.

Eisini varð umrøtt at gera týskt til upptøkukrav á hug-, búskapar- og fyrireikingarbreytini. Innan náttúruvísindi verður kravt av næminginum, at hann skal hava eina heildarfatan av hesum vísindum, tá hann er liðugur við fólkaskúlan. Tá hevur hann verið ígjøgnum fleiri náttúru lærugreinar, og náttúra og tøkni eru partur av hesi gongd. Til tríggjar av teimum sokallaðu bókligu breytunum er alis-evnafrøði eitt krav. Víst varð á, at sama tankagongd eigur at ráða innan mál- og samskiftisførleikar, at tá næmingur er liðugur við fólkaskúlan, skal hann hava eina heildarfatan av máli og skal hava verið ígjøgnum føroyskt, danskt, enskt og týskt. Mett var tí, at týskt eigur at vera eitt krav í mun til upptøku á hug-, búskapar- og fyrireikingarbreytini. Í hesum sambandi varð eisini víst á, at um týskt verður sett sum upptøkukrav á hugbreytini, verður búskaparbreytin einasta trý ára breytin, sum ikki hevur krav um ávísa lærugrein í sambandi við upptøku, og hetta kann vera óheppið.

Semja er ikki um, at týskt eigur at vera upptøkukrav á hug-, búskapar- og fyrireikingarbreytini, men víst verður á, at støða má takast til hetta.

- **Tilmæli 8: mælt verður til, at spurningurin um týskt sum upptøkukrav verður viðgjørdur neyvari**

Møguleikin at javnseta byrjanarmál A og framhaldsmál B var eisini umrøddur. Í mun til upptøkukrøv til hægri lesnað í Danmark er tað soleiðis, at byrjanarmál A og framhaldsmál B verða javnsett. Krøvini um fremmandamál á hugbreytini eiga tí at tillagast, soleiðis, at næmingar, sum velja framhaldsmál heldur enn byrjanarmál, ikki nýtast at taka tað upp á A-stig.

- **Tilmæli 9: Mælt verður til, at byrjanarmál A og framhaldsmál B verða javnsett**

Hetta kann gerast við at broyta § 8 í undirvísingarkunngerðini soleiðis:
  - punkt 1 í § 8 verður broytt til: eitt byrjanarmál á A-stigi ella eitt framhaldsmál á B stigi

## Lærugreinaráðgevar

Stórur tørvur er á at skipa fakliga ráðgeving til lærarar, og lærugreinaráðgevar eiga at verða settir á miðnámsskúlaøkinum. Hesir skulu virka sum serfrøðingar í teirra lærugreinum og fylgja við í tí, sum rørir seg í lærugreinini, umframt at vera við til at menna lærugreinina. Talan eigur at vera um lærara, sum undirvísir í lærugreinini, og sum so verður settur í hálvtíðarstarv sum lærugreinaráðgevi.

Umframt at svara spurningum, tá ivamál taka seg upp, og eigur lærugreinaráðgevin at tryggja, at

1. Lærarar eru kunnaðir um teir møguleikar og krøv, námsætlanin setur
2. Námsætlan og vegleiðing verða dagførd á hvørjum ári
3. Landsfevnandi lærugreinadagur verður skipaður á hvørjum ári

- **Tilmæli 10: Mælt verður til, at lærugreinaráðgevar verða settir beinanvegin**

## Toymir

Mett verður, at orðingin í §48 í undirvísingarkunngerðini er hóskandi breið. Betri vegleiðing varð eftirlýst, og tosað varð um, at toymisleiðarastarvið møguliga átti at verið lýst betur. Ført varð eisini fram, at tað er ógreitt, hvørjar uppgávurnar eru hjá ávikavist toyminum / lestrarvegleiðaranum / leiðsluni. Men víst varð eisini á, at tað er gott, at tað er leiðarin, ið tekur avgerðir, og at kunngerðin ikki skal stýra smálutum.

### Námsferðir

Námsferðir verða skipaðar eftir ymiskum leisti í ymisku skúlunum. Umrøtt varð at mæla til nærri ásetingar um námsferðir, og ført varð fram, at námsferðir kunnu vera órógvandi og taka ov nógva tíð frá vanligu undirvísingini. Semja var tó ikki um, at tørvur er á nærri ásetingum á hesum økinum.

## Próvtøkur

### Undirvísingarfrágreiðingar

Tá talan er um undirvísingarfrágreiðingar, brúka skúlarnir vanliga leist, sum lærararnir fylla út. Ført varð fram, at møguleiki átti at verið fyri, at lærarin kundi viðmerkja, hvørjar undirvísingargongdir vóru viðkomandi í próvtøkuhøpi, og hvørjar ikki vóru. Onnur vísti á, at hetta er ikki viðkomandi, tí tá farið verður til próvtøku, er talan um at eftirmeta førleikar og ikki lisið tilfar. Víst varð á, at tørvur er á vegleiðing um undirvísingarfrágreiðingarnar, og at hetta eigur at verða tikið upp í sambandi við dagføringina av námsætlanum, og í samstarvi við lærugreinaráðgevarnar.

### Próvtøkuhættir

Ført er fram, at talið av møguligum próvtøkuhættum sum heild eigur at minka. Í onkrari lærugrein er tó ynski um at fáa møguleika at velja ímillum ymiskar próvtøkuhættir.

Próvtøkuhættirnir og talið av teimum verða ásettir í námsætlanunum, og eiga tí at verða eftirmettir, endurskoðaðir og dagførdir í sambandi við dagføringina av námsætlanum. Hetta eigur at verða partur av uppgávuni hjá lærugreinaráðgevunum.

### Tal av próvtøkum

Samlaða talið av próvtøkum var umrøtt. Fleiri hildu, at talið av próvtøkum skuldi verið hægri, meðan onnur vístu á, at hægri krøv eiga ikki at vera sett til hetta enn sett verða til næmingar í donsku skipanini.

Sum nevnt í sambandi við breytaverkætlanina omanfyri, (síða 19) er nevndin samd um, at umframt at skriva uppgávuna, skal munnlig próvtøka vera í breytaverkætlanini. Ymiskir møguleikar eru at skipa hesa próvtøku, og støða eigur at verða tikin til nær henda próvtøka skal liggja, og hvussu hon skal skipast.

### Hagtøl

Ført varð fram, at skúlarnir javnan senda hagtøl um næmingatøl o.a. til Mentamálaráðið. Víst varð á, at tørvur er á, at hesi, umframt fleiri hagtøl, verða savnað og viðgjørd, so at støðan á økinum sum heild verður lýst betur.

## Yvirlit yvir framløgur hildnar á fundunum

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Úr lógini og kunngerðini – tilfar til fyrsta fundin | Sámal í Skorini | Februar 2017 |
| 2. | Breytirnar, felagslærugreinar og breytalærugreinar | Sámal í Skorini | Februar 2017 |
| 3. | Vallærugreinar og tvungin val | Helga Foldbo | Mars 2017 |
| 4. | Fyrireikingarbreytin | Helga Foldbo | Mars 2017 |
| 5. | Tímatøl, útbúgvingartíð og næmingatíð | Páll Isholm | Mars 2017 |
| 6. | Viðmerkingar um bond og leiðir | Sámal Matras Kristiansen | Mars 2017 |
| 7. | Frá fakbólkunum á Kambsdali | Bergmann Finnsson | Apríl 2017 |
| 8. | Breytauppgáva og breytaverkætlan | Hanna Ziskason Hansen | August 2017 |
| 9. | Mállærugreinar - fremmandamál | Barbara Vest | September 2017 |
| 10. | Námsferðir og læraratoymi | Gunnhild Dahl Niclasen | September 2017 |
| 11. | Søga | Súsanna Eikholm | September 2017 |
| 12. | Fremmandamál á miðnámi | Hanna Jensen | September 2017 |
| 13. | Hví danskt A? | Nikolina Olsen | September 2017 |
| 14. | Føroyskt | Kristinbjørg Høgnesen | September 2017 |
| 15. | Undirvísingarfrágreiðingar | Eyðun Leo | Oktober 2017 |
| 16. | Tal av próvtøkum | Helga Foldbo | Oktober 2017 |

## Yvirlit yvir tilfar, sum er latið landsstýriskvinnuni fyri seg

1. Hugskotskatalogið, sum er eitt arbeiðsskjal við viðmerkingum hjá einstøku limunum í nevndini
2. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 1: Úr lógini og kunngerðini
3. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 3: Vallærugreinar
4. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 6: Viðmerkingar um bond og leiðir
5. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 7: Frá fakbólkunum á Kambsdali
6. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 8: Breytauppgávan og breytaverkætlanin
7. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 9: Málllærugreinar – fremmandamál
8. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 10: Námsferðir og læraratoymi
9. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 11: Søga
10. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 12: Fremmandamál á miðnámi
11. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 13: Hví danskt A?
12. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 14: Føroyskt
13. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 15: Undirvísingarfrágreiðingar
14. Tilfar í sambandi við framløgu nr. 16: Tal av próvtøkum
15. Frá limum í nevndini, sum eru limir í Yrkisfelagnum Miðnám